

**TOYOTA COROLLA 1.6 TERRA H/B Aut.Gear** — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: BR 947 KM: 55.000
Árgangur: 30.06.00 Seinast sýnaður: 03.03.04
Viðmerking: Elrútar/spegl - Sentrallás - Radio/CD

Kr. 92.000,-



**TOYOTA AVENSIS 2,0 TD** — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: NE 068 KM: 133.000
Árgangur: 18.08.98 Seinast sýnaður: 16.01.04
Viðmerking: Fjarstýrt sentrallás - Elrútar framman

Kr. 94.000,-



**TOYOTA AVENSIS 1.8 SOL SED.** — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: NK 555 KM: 120.000
Árgangur: 09.11.98 Seinast sýnaður: 01.08.04
Viðmerking: Fjarstýrt sentrallás - El-rútar/spegl - Radio/CD

Kr. 88.000,-



**TOYOTA YARIS 1,5 T SPORT 5D 105 HK** — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: RM 603 KM: 55.000
Árgangur: 11.02.02 Seinast sýnaður:
Viðmerking: Fjarstýrt sentrallás - Radio/CD - Leðurróður - Spoilara - Alufelgur - Tokulyktir

Kr. 132.000,-



**TOYOTA COROLLA 1,4 5D TERRA H/B** — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: RL 974 KM: 29.000
Árgangur: 11.12.02 Seinast sýnaður: 11.12.02
Viðmerking: Elrútar/spegl - Fjarstýrt sentrallás - Radio/CD

Kr. 127.000,-



**CITROEN XSARA 2,0 HDI** — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: MH 802 KM: 105.000
Árgangur: 05.09.01 Seinast sýnaður: 29.06.04
Viðmerking: Fjarstýrt sentrallás - Aircondition - Hiti í setrum framman - Radio/CD Audiostrýring stýrt frá róðrinum.

Kr. 118.000,-



**TOYOTA COROLLA 1,6 TERRA 5D H/B** — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: SV 161 KM: 38.000
Árgangur: 10.05.02 Seinast sýnaður: 10.05.02
Viðmerking: Elrútar/spegl - Fjarstýrt sentrallás - Radio/CD - Topspoilara - Alufelgur

Kr. 142.000,-



**DAEWOO NUBIRA 2,0** — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: FB 737 KM: 57.000
Árgangur: 14.05.02 Seinast sýnaður: 14.05.02
Viðmerking: Elrútar A/F - Klima - Leðursetur - Radio/CD - Sentrallás

Kr. 98.000,-



**TOYOTA COROLLA 1,6 Liftback**

Skrásetingarnr.: MV 188 KM: 56.000
Árgangur: 09.09.99 Seinast sýnaður: 09.02.04

Kr. 78.000,-



**OPEL ASTRA 1,6 STW** — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: EV 255 KM: 49.000
Árgangur: 05.09.01 Seinast sýnaður: 15.03.05

Kr. 98.000,-

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, ið eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum prentvillum.




*Magni Arge, stjóri í Atlantic Airways, sigur at flogferðslan verður fingið í rættlag skjótast gjørligt, um veðrið heldur sær. Stjórin segði við Útvarpið mánadagin, at teir ongantíð fyrr hava verið úti fyri so nógvum mjórka*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# 2.400 fólk bíða eftir farti

**Klokkan tíggju mánamorgunin vóru 27 seinkaði flogfør, sum skuldu avgreiðast á flogvøllinum í Vágunum. Tá hesi eru avgreidd, kann "vanliga" flogferðslan byrja aftur**

FLOGFERÐSLA
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

Ólag hevur verið á flogferðsluni um vikuskiftið og farnu vikurnar. Á Hotel Vágum hava 1.000 fólk verið og etið síðan fríggjadagin, meðan tey hava bíðað eftir sínum flogfari. Tey flestu gistingarhúsini í miðstaðarøkinum hava verið fultsett um vikuskiftið, tí ferðafólk eru ikki sloppin víðari.

Fyrrapartin í gjár, áðrenn blaðið fór til prentingar, skuldu 14 flogfør lenda í Vágunum, og 13 fráferðir vóru á skránni.

Á middegi mánadgain segði Magni Arge, stjóri á Atlantic Airways, við Útvarpið at felagið hevði 2.400 fólk í skipanini, sum skuldu fáast víðari.

Atlantic Airways hevur tískil nógv um at vera við sínum fýra flogførum. Sum skilst flýgur eitt flogfar fasta rutu í Noreg, meðan hini trý røkja ferðaleiðirnar millum Føroyar og grannar okkara. Føroyska flogfelag hevur eisini leigað flogfør til at røkja ávísar rutur. Eitt felag í London røkir leiðina millum Vágar og London, og úr Aberdeen til Vágar flýgur eitt annað felag fyri Atlantic.

Hini trý flogførini røkja rutuna millum Føroyar og Keypmannahavn, og Føroyar og Ísland. Hesi trý flogførini skulu royna at vinna innaftur mistu tíðina og fáa ferðaætlanina í rættlag aftur. Tað merkir, at flogførini komandi nógvu tímarnar noyðast at vera í støðugari flúgving fyri at koma upp undan aftur.

Magni Arge segði við Útvarpið í gjár, at tá komið var út á mánakvøldið, og um veðrið helt sær, so vóru teir komnir væl áleiðis við at fáa øll ferðafólkini til høldar.